

FØROYA
ARBEIÐSGEVARAFELAG

# Ársfrásøgn

juni 2021

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Innihaldsyvirlit


**Frágreiðing frá nevndini . . . 4**

**Farna árið við samráðingum og tiltøkum . . . 6**

Privati arbeiðsmarknaðurin . . . 6
- Samráðingarrundan 2020-2022 . . . 6
- Sáttmálin við Maskinmeistarafelagið . . . 6
- Sáttmálin við Atlantic Workers Union . . . 6
- Sáttmálin við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna . . . 6
- Sáttmálin við Starvsfelagið fyri Føroya Tele . . . 6
- Sáttmálarnir um manningar í handilsflotanum . . . 7
- Samráðingar við Grafiska Yrkisfelagið . . . 7
- Samráðingar við S&K-felagið . . . 7
- Samráðingar við YTF og Finansforbundet . . . 7
- Samráðingar við YTF um starvsfólk á Elektron . . . 8
- Komandi sáttmálasamráðingar . . . 8

Koronatilmælini avlýstu størru tiltøkini . . . 8

**Farna árið í vinnuni . . . 9**

Korona endavendi øllum í 2020 . . . 9
Ferðavinnan flutt nógv ár aftur í tíðina . . . 9
Korona eisini neiligar avleiðingar á føroyska útflutningin . . . 10
Heimligi eftirspurningurin farin nógv upp undir Korona . . . 14
Samlaða virksemið tí ikki minkað undir Korona . . . 17
Framtíðarútlitini framvegis merkt av fleiri óvissum . . . 17

**Tilmælir frá Føroya Arbeiðsgevarafelag . . . 18**

Atgongd til arbeiðsmegi . . . 18
Fiski- og handilsvinnuavtalur . . . 19
Dagføra kappingaravlagandi skipanir . . . 19
Støðugar karmar og langtíðarætlanir . . . 19
Lægri lønarskatt og kappingarføra skattaskipan . . . 20

**Føroya Arbeiðsgevarafelag . . . 21**

Limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag . . . 21
Uppgávur og endamál hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag . . . 21
Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag . . . 22
Vinnuhúsið . . . 24




# Frágreiðing frá nevndini



**Bogi Jacobsen**
Nevndarformaður

Hetta seinasta hálvtannað árið hevur verið ein heilt serlig tíð fyri føroyska vinnu og alt tað føroyska samfelagið annars.

Eingin hevði ávarað um, at ein koronafarsótt fór at endavenda øllum forsøgnum og spádómum, tá ið farið var um grækarismessu 2020. Síðan hevur Korona og óvissan um avleiðingarnar av koronatiltøkunum fylt nógv í gerandisdegnum kring allan knøttin, og koronatiltøkini úti í heimi hava í stóran mun ávirkað føroyska útflutningsvirðið skeiva vegin.

Munandi partur av føroyska fiskaútflutninginum fer til matstovur, sum hava verið stongdar, stóran part av tíðini, síðan mars 2020.

Útflutningsfyritøkurnar hava tí roynt at tillagað framleiðsluna til aðrar marknaðir og meira lidnar vørur til endaliga brúkaran. Hetta hevur vigað nakað upp ímóti missinum í eftirspurninginum frá matstovuvinnunum, men langt frá nóg mikið til at javnviga langtíðaravleiðingarnar í útflutningsvirðinum.

Bæði nøgd og prísir eru fallin, men hóast laksaprísirnir hava ligið heilt niður ímóti framleiðslukostnaðinum, hetta tíðarskeiðið, so hevur tað ikki minkað um lønargjaldingarnar í alivinnuni. Heldur tvørturímóti, tí meirvirking av laksi til endabrúkaran hevur skapt meira virksemi her heima. Alifyritøkurnar hava tí sjálvar átikið sær fallið í prísinum á útflutta laksinum.

Í fiskivinnuni er prísfallið sum frálíður flutt yvir á veiðiliðið, soleiðis at fiskiflotin fær minni fyri avreiðingarnar.

Í heimligu vinnunum hevur tað annars samanumtikið gingið heilt væl.

Nakað eftir, at fyrstu koronatiltøkini høvdu køvt føroysku ferða- og matstovuvinnurnar og skelkurin hevði lagt seg, kyknaði av álvara undir heimliga eftirspurningin. Sølan í heimligu handilsvinnuni er vaksin millum 10 og 20%, hesa tíðina, meðan koronatiltøkini hava forðað føroyingum at fara av landinum at ferðast.

Byggivinnan hevur eisini havt úr at gera, men stóra trýstið á føroysku byggivinunna, seinastu árini, er minkað. Hetta kemst av, at fleiri stórar verkætlanir eru lidnar og avhandaðar hesa seinastu tíðina.

Samanumtikið er føroyska samfelagið tí komið heilt væl ígjøgnum koronatíðina. Tað sást eitt lítið kvink uppeftir í arbeiðsloysinum, beint eftir, at koronatiltøkini vórðu sett í verk í mars 2020, men samanborið við onnur lond, ber ikki til at siga, at vit hava nakað arbeiðsloysið í Føroyum. Føroyska arbeiðsloysið liggur í løtuni um 1,6%.

Ein týðandi orsøk til, at Føroyar eru komnar so væl ígjøgnum hesa tíðina eru føroysku átøkini at forða smittuni at koma fyri seg í samfelagnum. Føroyska koronatilbúgvingin, við áhaldandi koronakanningum, saman við virðingini hjá øllum føroyingum fyri koronatiltøkunum, hevur verið fyrimyndarlig. Hvørja ferð smittuspjaðingin hevur hótt við at taka seg upp aftur, hevur tað í felag eydnast okkum at fáa tamarhald á smittuni.

Tí hevur tað borið til at havt samfelagið og heimligu vinnuna koyrandi, hóast koronasmittan hevur hingið sum eitt myrkt skýggj yvir okkum í skjótt hálvtannað ár.

Tað valdar framvegis óvissa um, hvussu seinárinini av koronafarsóttini fara at ávirka vinnu og búskap í nærmastu framtíð, men avleiðingarnar av koronastongslunum síggjast nú aftur í vørumangli og munandi hægri flutningsgjøldum á heimshøvunum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag brúkar nógva orku til samráðingar og ymsar spurningar um sáttmálaviðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum. Soleiðis hevur eisini verið í undanfarna ári.

Samráðingarrundan 2020-2022 byrjaði við samráðingum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fimm arbeiðarafeløgini. Úrslitið var tvey ára sáttmálar við eini lønarhækkan á 2,05% fyrra árið, har lønarhækkingin varð galdandi frá 1. august, og 1,25% seinna árið.

Hetta hevur verið støðið undir øllum samráðingunum higartil í hesi samráðingarrunduni, og karmurin er hildin, nú bert tríggir sáttmálar eru eftir, áðrenn henda samráðingarrundan er liðug.

Nýggja samráðingarrundan byrjar 1. mai 2022, tá ið sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini ganga út.

Koronatiltøkini hava havt stóra ávirkan á gerandisdagin og vanliga virksemið í Vinnuhúsinum. Vinnudagurin, sum hevur verið hildin á hvørjum ári seinastu 20 árini, varð fyri fyrstu ferð avlýstur í fjør. Eisini aliráðstevnan varð avlýst, men hesi tiltøkini eru komin á skrá aftur, og vónandi verður tað gjørligt at halda Vinnudagin aftur í heyst.

Annars hevur Vinnuhúsið brúkt nógva tíð til ráðgeving og vegleiðing til politisku skipanina og limir sínar, síðan koronatiltøkini vórðu sett í verk, og meðan tey hava verið galdandi.

Um hugt verður longur fram í tíðina, so mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag framvegis til, at vinnupolitikkurin verður endurskoðaður og tillagaður dagsins samfelag. Vinnupolitikkurin eigur at taka støði í nútíðini og framtíðar avbjóðingunum hjá vinnu og samfelag.

Nakrar av tillagingunum í vinnupolitikkinum snúgva seg millum annað um atgongdina til arbeiðsmegi, sum hevur verið ein bygnaðarligur trupulleiki hjá føroyskari vinnu í nógv ár. Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir eisini eina øðrvísi og kappingarføra skatta- og avgjaldsskipan við lægri lønarskatti og fleiri tænastugjøldum, umframt fleiri handils- og fiskivinnuavtalur við onnur lond.

Vinnupolitikkurin eigur at verða vegvísari, har politikarar taka atlit at dagførda vinnupolitikkinum í politisku stýringini av samfelagnum, soleiðis at vinnan veit, hvørjar karmar hon hevur at virka innanfyri fleiri ár fram í tíðina.

Tórshavn, tann 7. juni 2021

**Bogi Jacobsen**
Nevndarformaður

# Farna árið við samráðingum og tiltøkum

**Føroya Arbeiðsgevarafelag brúkar nógva orku til samráðingar og ymsar spurningar um sáttmálaviðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum. Soleiðis var eisini í undanfarna ári, har tað annars hevur verið Korona, ið hevur merkt dagsskránna síðan grækarismessu 2020. Fleiri tiltøk hava verið avlýst, samstundis sum Vinnuhúsið hevur brúkt nógva orku til ráðgeving og vegleiðing til limirnar og politisku skipanina um koronatilmælini og hjálparpakkarnar**

## Privati arbeiðsmarknaðurin

Føroya Arbeiðsgevarafelag, við undirfeløgum tess, varðar av øllum sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum á landi umframt sáttmálunum fyri handilsskip. Størsta sáttmálaøkið eru sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

Samráðingarnar við hesi feløg eru tær fyrstu í hvørjari nýggjari samráðingarrundu og leggja hesar støðið undir øllum sáttmálunum í runduni.

### Samráðingarrundan 2020-2022

Samráðingarrundan 2020–2022 byrjaði við samráðingunum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fimm arbeiðarafeløgini. Úrslitið var eitt 2 ára sáttmálaskeið, galdandi frá 1. mai 2020 til 1. mai 2022.

Karmur var 2,05% fyrra árið, har lønarhækkingin varð seinkað 3 mánaðir, soleiðis at lønarhækkingin bert var galdandi fyri 9 mánaðir, og 1,25% seinna árið frá 1. mai 2021.

Samráðingarnar í 2020 hava verið merktar av serligu støðuni við Korona, sum hevur ávirkað millum annað framleiðslu-, útflutnings og ferðavinnufyritøkur sera nógv og elvt til stóra óvissu í vinnuni yvirhøvur.

### Sáttmálin við Maskinmeistarafelagið

Mánadagin 31. august 2020 skrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Maskinmeistarafelagið undir nýggjan tvey ára sáttmála fyri maskinmeistarar á landi, galdandi frá 1. juni 2020 til 1. juni 2022.

Semjan fylgdi karminum, sum varð lagdur til samráðingarnar við arbeiðarafeløgini. Á sama hátt sum fyrstu sáttmálarnar í hesi samráðingarrunduni var avtalað, at lønarhækkingin byrjaði tríggjar mánaðir eftir, at sáttmálin kom í gildi.

### Sáttmálin við Atlantic Workers Union

Fríggjadagin 11. september 2020 varð nýggjur tvey ára sáttmáli undirskrivaður fyri flogmekanikarar, galdandi frá 1. oktober 2020 til 1. oktober 2022.

Semjan hevur somu lønarhækkingar, sum hinar semjurnar, ið Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt í samráðingarrundini 2020-2022.

Lønarhækkingin varð løgd bæði á løn og eftirløn, galdandi frá 1. januar 2021, ístaðin fyri 1. oktober 2020. Fyrsta árið hækkaði lønin 1,25% og eftirlønin 1%. Tann 1. oktober 2021 hækkar lønin 1,25%.

### Sáttmálin við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna

Hósdagin 15. oktober 2020 gjørdu Føroya Arbeiðsgevarafelag øðrumegin og Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna hinumegin semju um nýggjan tvey ára sáttmála, galdandi frá 1. oktober 2020 til 1. oktober 2022.

Semjan hevur sama kostnaðarstøði sum aðrar semjur hetta sáttmálaskeiðið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag. Lønin hækkaði ikki fyrr enn tríggjar mánaðir inn í sáttmálaskeiðið.

### Sáttmálin við Starvsfelagið fyri Føroya Tele

Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsfelagið skrivaðu undir nýggjan tvey ára sáttmála fyri Føroya Tele 8. desember 2020, galdandi frá 1. januar 2021 til 1. januar 2023.

Í samráðingunum, sum byrjaðu við arbeiðarafeløgini, varð lønarhækkingin fyrra árið býtt yvir 9 mánaðir,




men í semjuni við Starvsfelagið varð hækkingin býtt yvir 12 mánaðir, og lønarhækkingin í prosentum lækkaði samsvarandi.

1. januar 2021 hækkaði lønin 1,5375%. 1. januar 2022 hækkar lønin fyrst 0,5125% roknað av lønini ultimo 2020, og við støði í hesum hækkar lønin síðani 1,25%, somuleiðis 1. januar 2022. Á henda hátt fekk Starvsfelagið neyvt somu hækking sum onnur á sáttmálaøkinum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

## Sáttmálarnir um manningar í handilsflotanum

Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið samráddust hesaferð saman, meðan samráðingar við Fiskimannafelagið vóru fyri seg. Tað er Reiðarafelagið fyri Handilsskip, sum er limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, ið samráðist við manningarfeløgini.

Fyri øll feløgini er talan um ein yvirskipaðan sáttmála og tveir sersáttmálar fyri frálandaskip.

Mánadagin 22. februar 2021 skrivaðu Reiðarafelagið fyri Handilsskip og Føroya Fiskimannafelag undir nýggjar tvey ára sáttmálar. Semjan hevði við sær eina lønarhækking á 1,93% 1. juni 2021 og 1,25% 1. mars 2022. Afturat hesum vóru eisini aðrar tillagingar í sáttmálanum.

Mikudagin 24. februar 2021 skrivaðu Reiðarafelagið fyri Handilsskip, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið undir nýggjar tvey ára sáttmálar. Semjan hevði við sær eina lønarhækking á 1,55% 1. juni 2021 og 1,25% 1. mars 2022. Semja var eisini um, at eftirlønin hækkar 0,5%, soleiðis at hon kemur upp í 13%, umframt aðrar tillagingar í sáttmálanum.

Allir sáttmálarnir ganga til 1. mars 2023.

## Samráðingar við Grafiska Yrkisfelagið

Mikudagin 3. mars 2021 varð semja gjørd millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Prentsmiðjufelag øðrumegin og Landsfelag Handverkaranna og Grafiska Yrkisfelagið hinumegin fyri sáttmálan um miðlagrafikarar og grafiskar tøkningar. Sáttmálin er galdandi frá 1. mai 2021 til 1. mai 2023.

Sáttmálin fylgdi karminum fyri hesa samráðingarrundina.

## Samráðingar við S&K-felagið

Føroya Arbeiðsgevarafelag og S&K felagið undirskrivaðu mánadagin 20. apríl 2021 nýggjan tvey ára sáttmála, galdandi frá 1. mai 2021 til 1. mai 2023.

Hækkingin var á sama kostnaðarstøði sum aðrar semjur hesa samráðingarrunduna. Umframt lønarhækking hækkar eftirlønin við 1,26% 1. august 2021, soleiðis at hon verður 15%.

## Samráðingar við YTF og Finansforbundet

Mánadagin 14. apríl og fríggjadagin 27. apríl 2021 gjørdu Føroya Arbeiðsgevarafelag semju um nýggjar tvey ára sáttmálar við ávikavist Finansforbundet og YTF galdandi frá 1. mai 2021 til 1. mai 2023.

Í báðum førum varð talan um tvey ára sáttmálar, og lønarhækkingin fylgdi karminum frá samráðingarrundini 2020-2022.

### Samráðingar við YTF um starvsfólk á Elektron

Týsdagin 25. mai 2021 gjørdu Føroya Arbeiðsgevarafelag semju um nýggjan sáttmála við YTF um starvsfólk á Elektron, galdandi frá 1. juni 2021 til 31. mai 2023.

Talan var um tvey ára sáttmála, og lønarhækkingin fylgdi karminum frá samráðingarrundini 2020-2022.

### Komandi sáttmálasamráðingar

Sáttmálarnir, ið eftir eru at samráðast um í hesi samráðingarrunduni, ganga út sum víst niðanfyri.

| | |
|---|---|
| 1. nov 2021 | Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk |
| 1. nov 2021 | Sáttmálin við Súluna |
| 1. jan 2022 | Sáttmálin við Starvsfelagið fyri Posta |
| **1. mai 2022** | Sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini ganga út-Nýggj samráðingarrunda byrjar |

## Koronatilmælini avlýstu størru tiltøkini

Koronafarsóttin hevur havt við sær, at fleiri tiltøk, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag og feløgini í Vinnuhúsinum plaga at skipa fyri, hava verið avlýst, síðan tiltøkini at forða smittuni at spjaða seg, vórðu sett í verk á grækarismessu 2020.

Vinnuhúsið hevur skipað fyri árliga Vinnudegnum í 20 ár út í eitt, men í fjør høvdu koronatiltøkini við sær, at Vinnudagurin 2020 varð avlýstur. Tað er framvegis týdningarmikið at halda fast við henda eina dagin um árið, har høvi er at hátíðarhalda føroyskt vinnulív. Vinnudagurin er settur aftur á skránna 1. oktober í ár.

Árliga Aliráðstevnan, sum Havbúnaðarfelagið vanliga skipar fyri, varð somuleiðis avlýst í ár fyri at halda koronatilmælini.

Tað hevur tó eydnast Føroya Arbeiðsgevarafelag at halda hesi heimleiðistiltøkini hetta seinasta árið.

- Føroya Arbeiðsgevarafelag hitti limir í Suðuroynni
- GDPR tiltak í Suðuroy
- GDPR tiltak í Klaksvík
- GDPR tiltak í Havn

Harumframt hava vinnugreinafeløgini í Vinnuhúsinum skipað fyri ymsum tiltøkum, ið hava verið hildin samsvarandi galdandi koronatilmælum. Meira fæst at vita um hesi tiltøkini, undir "Vinnugreinafeløg" á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Annars hevur Vinnuhúsið brúkt nógva tíð til ráðgeving og vegleiðing til politisku skipanina og limir sínar, síðan koronatiltøkini vórðu sett í verk, og meðan tey hava verið galdandi. Hetta hevur millum annað verið gjørt við einari COVID-19 síðu á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, umframt beinleiðis ráðgeving og vegleiðing til limirnar í Føroya Arbeiðsgevarafelag og vinnugreinafeløgunum í Vinnuhúsinum um, hvussu limirnar kunnu bera seg at, tá tað kemur til smittufyribyrgjandi atferð á arbeiðsplássinum og starvsfólkaøkinum.

Vinnuhúsið hevði eisini eina røð av greinum, um gongdini í ymsum fyritøkum, fyrstu mánaðirnar við Korona. Hetta var gjørt einamest fyri at fáa eina støðulýsing av, hvussu vinnufyritøkur vóru ávirkaðar av avmarkandi tilmælunum, men eisini fyri at skjalfesta til eftirtíðina.

Vinnuhúsið hevur eisini havt tætt samskifti við politisku skipanina og almennu myndugleikarnar í tilgongdini at fyrireika hjálparpakkar og ymsu koronatilmælini.



# Farna árið í vinnuni

**Partar av føroysku vinnuni hava fingið ein dyggan frammaná av heimsumfatandi koronatiltøkunum, sum vórðu sett í verk tíðliga í 2020, men samanumtikið er føroyski samfelagsbúskapurin komin heilt væl ígjøgnum tíðina við Korona. Hetta orsakað av, at heimligi eftirspurningurin tók rættiliga dik á seg, eftir at fyrsti koronaskelkurin hevði lagt seg.**

## Korona endavendi øllum í 2020

Tá vit komu inn 2020 var manglandi arbeiðsmegi største avbjóðingin hjá føroysku vinnuni, men vinnan visti, at trýstið fór at minka nakað út á árið, tí fleiri størri byggiverkætlanir nærkaðust endanum.

Tá hevði eingin ímynda sær, at ein farsótt, ið hevði tikið seg upp í Kina, síðstu mánaðirnar av 2019, fór at endavenda øllum forsøgnum og spádómum um vinnu og búskap kring allan heimin, tá smittuspjaðingin rættiliga kom fyri seg, tíðliga í 2020.

Koronafarsóttin spjaddi seg skjótt um allan heimin, tá ið bert fáir mánaðir vóru farnir av 2020, og í mars 2020 vóru stórir partar av heimssamfelagnum læstir niður fyri at fáa tamarhald á smittuspjaðingini.

Tað er rættiliga ymiskt, hvussu avleiðingarnar av koronatiltøkunum hava rakt føroysku vinnuna. Í nøkrum vinnugreinum varð teppið skrykt undan inntøkugrundarlagnum, sum hvarv yvir nátt. Í øðrum vinnugreinum er eftirspurningurin øktur munandi undir koronatiltøkunum, meðan aftur aðrar ikki hava merkt stórvegis avleiðingar av tiltøkunum.

## Ferðavinnan flutt nógv ár aftur í tíðina

Útlitini og fortreytirnar fyri framhaldandi vøkstri í føroysku ferðavinnuni vóru serstakliga góð og jalig, áðrenn koronatiltøkini brádliga læstu ferðavinnuna niður.

Føroysku ferðavinnan hevði væntað, at 2020 fór at gerast besta árið nakrantíð, men koronatiltøkini vendu framgongdina til afturgongd, ið hevur verið verri enn daprastu forsagnirnar, sum vórðu gjørdar beint eftir grækarismessu 2020, tá ið tiltøkini at forða smittuni at spjaða seg vórðu sett í verk.

Hagtølini fyri føroysku ferða-, gistingarhús- og matstovuvinnurnar tala fyri seg.

Bruttovirðisøkingin frá ferðafólkum fór úr 165 mió. kr. í 2011 upp í 421 mió. kr. í 2019, og ferðavinnan væntaði, at bruttovirðisøkingin før at nærkast einari hálvari milliard í 2020, men inntøkurnar frá útlendsku ferðafólkunum fóru beint tann øvugta vegin. Bruttovirðisøkingin í ferðavinnuni minkaði úr 421 mió. kr. í 2019 niður í 123 mió. kr. í 2020, sí mynd 1. Hetta svarar til eina afturgongd á 70%.

**Mynd 1: Bruttovirðisøking frá útlendskum ferðafólkum, 2011-2020.**




*Kelda: Visit Faroe Islands - Ársfrásøgn 2020.*

Í 2020 fóru næstan 180.000 ferðafólk um flogvøllin í Vágunum. Hetta eru 58% færri enn í 2019, tá 424.000 ferðafólk fóru um flogvøllin. Ferðafólkatalið í 2020 var eisini umleið 20.000 lægri enn fyri 10 árum síðan. Í 2010 fóru 200.000 fólk um flogvøllin.

Fyrstu fýra mánaðirnar í ár fóru umleið 30.000 ferða-fólk um flogvøllin í Vágunum. Hetta er næstan helvtin av ferðafólkatalinum somu tíð í fjør, og minni enn ein triðing av ferðafólkatalinum í 2019, sí mynd 2.

**Mynd 2: Ferðafólk um flogvøllin, januar-apríl, 2011-2021.**




*Kelda: Vága Floghavn.*

**Mynd 4: Lønargjaldingar frá gistingarhúsum og matstovum, 2011-2020.**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Áðrenn koronaskelkin høvdu gistingarhúsini gjørt stórar íløgur fyri at kunna taka ímóti vaksandi ferðafólkatalinum frameftir, men avleiðingarnar av koronatiltøkunum høvdu við sær, at talið av gistingum og hotelkapasiteturin fóru hvør sín veg. Talið av gistingum fall við 89.233 gistingum frá 2019 til 2020, úr 197.886 niður í 108.653, svarandi til eina minking á 45%. Samstundis øktist gistingarkapasiteturin[1] við 13% fleiri kømrum og 10% fleiri seingjum, sí mynd 3.

**Mynd 3: Gistingar og gistingarkapasitetur, 2013-2020.**




*Kelda: Visit Faroe Islands - Ársfrásøgn 2020.*

Úrslitið í føroysku ferðavinnuni í 2020 gjørdist sostatt ein viðfáningur av, hvat væntað varð frammanundan. Umsetningurin fall úr 784 mió. kr. í 2019 niður í 313 mió. kr. í 2020. Ársverkini í ferðavinnuni fullu úr 715 í 2019 niður í 438 í 2020. Lønargjaldingarnar frá gistingarhúsum og matstovum minkaðu úr 167 mió. kr. í 2019 niður í 132 mió. kr. í 2020, sí mynd 4. Hetta svarar til eina niðurgongd í lønargjaldingunum á góð 20%.

Umleið 30.000 útlendsk ferðafólk vitjaðu Føroyar í 2020, samanborið við umleið 140.000 í 2019[2].

Meira fæst at vita um gongdina í føroysku ferðavinnuni í ársfrásøgnini 2020 hjá Ferðavinnufelagnum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Almennu hjálparpakkarnir tóku broddin av ringastu avleiðingunum, fyrstu tíðina, eftir at koronatilløkini vórðu sett í verk í mars 2020. Serliga fyrsti hjálparpakkin við lønarískoytinum frá ALS eydnaðist væl fyri koronastongdu fyritøkurnar, ið sendu nógv fólk til hús við sera óvissum útlitum um framtíðina.

## Korona eisini neiligar avleiðingar á føroyska vøruútflutningin

Frá 2010 til 2017 var ein javnur vøkstur í føroyska útflutningsvirðinum, og nógv tann størsti parturin av føroyska vøruútflutninginum er fiskur og fiskavørur, sí mynd 5.



1 *Gistingarkapasitetur = sengur ella kømur x dagar í mánaði.*
2 *Visit Faroe Islands - Ársfrásøgn 2020.*

**Mynd 5: Føroyski vøruútflutningurin, 2010-2020.**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Í 2018 minkaði útflutningsvirðið á fiski og fiskavørum umleið 900 mió. kr., úr 8,4 mia. kr. niður á 7,5 mia. kr. Í 2019 vaks útflutningsvirðið á fiskavørunum aftur við næstan 1,5 mia. kr., upp í 8,9 mia. kr., fyri síðan at minka aftur 1,2 mia. kr., niður á 7,7 mia. kr. í 2020.

**Mynd 6: Føroyskur fiskaútflutningur, 2015-2020.**




*Kelda: Hagstova Føroya.*



Í 2018 var tað serliga útflutningsvirðið á laksi og uppsjóvarfiskasløgunum, makreli og sild, sum trýsti samlaða útflutningsvirðið niður, sí mynd 6.

Í 2020 hava tað verið avleiðingarnar av koronatiltøkunum úti í heimi, sum hava drigið føroyska útflutningsvirðið skeiva vegin. Stórur partur av føroysku fiskavørunum verður keyptur av útlendskum matstovum, ið hava verið stongdar, síðan koronafarsóttin fór at gera um seg kring allan heimin, tíðliga í 2020.

Eftirspurningurin skifti tí í stóran mun frá gistingarhúsum, matstovum og matveiting yvir í smásølu til brúkaran. Hetta skiftið hevur tó ikki megnað at vigað upp í móti inntøkumissinum frá matstovumarknaðunum, sum hava verið stongdir av koronatiltøkum, stóran part av tíðini síðan mars 2020, og fyri nøkur fiskasløg er eftirspurningurin minkaður niður í einki hetta tíðarskeiðið.

## Botnfiskur

Størsti parturin av útflutta føroyska botnfiskinum verður seldur á matstovum uttanlands. Koronatiltøkini úti í heimi rakti tískil eftirspurningin eftir botnfiski og tilvirkaðum botnfiski meint.

Tað var framvegis stórur vøkstur í útflutningsvirðinum á toski, hýsu og upsa, tá tiltøkini at forða koronasmittuni at spjaða seg læstu stórar partar av marknaðunum niður fyri hesi botnfiskasløgini. Fiskaframleiðarar fingu tí beinanvegin avbjóðingar við ov stórum goymslum, men fingu sum fráleið tillagað goymslurnar til minkandi eftirspurningin og fallandi prísirnar, sum eru fluttir yvir á veiðiliðið við væl lægri avreiðingarprísum. Samstundis hevur fiskiskapurin eftir mest vanligu botnfiskasløgunum verið sera vánaligur hesa seinastu tíðina.

Útflutningsvirðið av mest vanligu botnfiskasløgunum toski, hýsu og upsa minkaði tí nógv í 2020, sí mynd 6. Á toski minkaði virðið 28%, á hýsa minkaði virðið 14% og á upsa minkaði virðið 6%.

*„Koronatiltøkini úti í heimi hava rakt eftirspurningin eftir botnfiski og tilvirkaðum botnfiskavørum meint."*

Meira fæst at vita um gongdina í botnfiskaframleiðsluni í ársfrásøgnini 2020 hjá Ráfiskarakeyparafelagnum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

## Laksur

Avleiðingarnar av koronatiltøkunum kring heimin fingu eisini stóra ávirkan á eftirspurningin eftir laksavørum. Eftirspurningurin frá gistingarhúsum, matstovum og matveitarum minkaði í stórum, meðan eftirspurningurin eftir sokallaðum portiónum frá vanligum matvøruhandlum vaks.

Seinastu árini hevur føroyskur havbúnaður staðið fyri slakari helvt av samlaða føroyska fiskavøruútflutninginum, og laksur er greitt tann største einstaka útflutningsvøran úr Føroyum. Frá 2014 til 2019 lág virðið á laksaútflutninginum millum 45 og 48% av samlaða fiskvavøurútflutninginum, men í 2020 minkaði útflutningsvirðið á laksi niður í 43% av samlaða fiskavøruútflutninginum, svarandi til 700 mió. kr., úr góðum 4 mia. kr. í 2019 niður í 3,3 mia. kr. í 2020.

Fyritøkurnar í alivinnuni fóru beinanvegin í holt við at tillaga virksemið, eftir at koronasmittan fór at gera um seg. Tøkan var økt fyri at minka um váðan og betra um gjaldførið. Laksaprísirnir hava í fleiri førum ligið heilt niður ímóti framleiðslukostnaðinum hetta seinasta árið, men hetta hevur ikki minkað virksemið og lønargjaldingarnar í alivinnuni. Heldur tvørturímóti, tí partur av framleiðsluni er lagdur um til portiónir og meirvirking av laksi til endaliga brúkaran, sum hevur skapt meira virksemi her heima.

*„Laksaprísirnir hava ligið heilt niður ímóti framleiðslu-kostnaðinum hetta seinasta árið."*

Føroysku alifyritøkurnar hava eisini tillaga spjaðingina av útflutninginum landafrøðiliga undir koronafarsóttini. Eins og undanfarin ár fóru umleið 96% av laksaútflutninginum til teir fýra høvuðs-marknaðirnar ES, USA, Russland og Kina, men trupulleikar við flutningi til fjarskotnar marknaðir hevur havt við sær, at ein lutfalsliga størri partur er útfluttur til ES samanborið við undan farin ár. Lutfalsliga minni partur er farin til Kina og nakað minni til USA, meðan Russland helt sær á nakað sama støði.

Greiningarfyritøkan Kontali metir, at heimsfram-leiðslan av laksi í 2021 væntandi økist umleið 2-3% samanborið við í fjør, meðan útboðið væntandi fer at økjast umleið 5-6% orsakað av sølu frá goymslu. Koronatiltøkini gera tað torført at meta um prísgongdina, tað sum er eftir av 2021, men gongur tað væl at koppseta fólk kring heimin, soleiðis at matstovur og gistingarhús lata upp aftur, so fer tað at hava jaliga ávirkan á eftirspurningin eftir laksi.

Meira fæst at vita um føroyska havbúnaðin í ársfrásøgnini 2020 hjá Havbúnaðarfelagnum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo



## Uppsjóvarfiskur

Útflutningsvirðið av uppsjóvarfiski minkaði eisini í 2020 orsakað av Korona. Tað, ið órógvar uppsjóvarvinnuna í hesum tíðum, er atgongdin til at fiska í fremmandum sjógvi.

*„Tað, ið órógvar uppsjóvarvinnuna í hesum tíðum, er atgongdin til at fiska í fremmandum sjógvi"*

Føroyar mistu atgongdina til bretskan sjógv, tá ið Brexit gjørdist veruleiki, og føroysku uppsjóvarskipini mugu tí fiska kvoturnar í føroyskum sjógvi, ístaðin fyri bretskum sjógvi. Hetta hevur stórar avleiðingar fyri prísin á t.d. makreli, sum hevur nógv hægri prís, tá ið hann hevur etið seg feitan í føroyskum sjógvi og flutt seg yvir í bretskan sjógv.

So at siga allur uppsjóvarfiskurin, sum føroysk skip fiska, verður landaður til føroysku uppsjóvarvirkini. Harumframt verður eisini eitt sindur landað frá útlendskum skipum. Rávørutilgongdin til føroysku uppsjóvarvirkini er tí í stóran mun tengd at kvotunum av uppsjóvarfiski, sum er tillutað føroyskum skipum.

Útflutningsnøgdin av makreli var 12% hægri í 2020 enn í 2019, men útflutningsvirðið var bert 2% hægri. Í 2020 minkaði útflutningsnøgdin av sild 14% og virðið 16%, og fyri svartkjaft minkaði nøgdin 2% og virðið 14% samanborið við 2019.

Koronakreppan er ikki farin framvið uppsjóvarvinnuni uttan avleiðingar, men tað eru manglandi avtalur um rættindini at fiska aðrastaðni, sum órógva uppsjóvarflotanum mest í hesum døgum.

Í løtuni eru lítil útlit fyri, at nøkur fiskiveiðuavtala verður gjørd við Stórabretland í bræði.

Meira fæst at vita um føroysku uppsjóvarvinnuna á heimasíðuni hjá Felagnum Nótaskip, www.notaskip.fo

## Shipping og frálandavinna

Umframt fiskivinnuna, so hevur føroyska shippingvinnan nógv virksemi uttanfyri landoddarnar, sum geva stórar inntøkur til føroyska samfelagsbúskapin. Tað ber tó illa til at siga, hvussu stórar upphæddir talan er um, tí shippingvinnan er ein tænastuvinna, og føroyski tænastujavnin er ikki dagførdur. Í 2019 vóru knapt 1.800 fólk knýtt at føroysku shippingvinnuni. Í januar í ár var hetta talið umleið 1.500, har upp móti 1.200 vóru umborð á skipum og á landi nærkaðist starvsfólkatalið 300.



*„ ...føroyska shippingvinnan nógv virksemi uttanfyri landoddarnar, sum geva stórar inntøkur til føroyska samfelagsbúskapin."*

Føroyska shippingvinnan er tí fyri stóran part ein altjóða vinna, har eftirspurningurin er tætt knýttur at gongdini í altjóða konjunkturunum. Avleiðingarnar av koronafarsóttini í altjóða samfelagnum hava tí eisini sett síni spor í føroysku shippingvinnuni.

Uttanlands er flutningur sjóvegis vorðin dýrari, men í Føroyum hevur prísurin verið óbroyttur. Føroysk reiðarí hava tillagað sítt virksemi, og sum heild hevur støðan hjá føroysku flutningsfyritøkunum verið toluliga støðug hetta tíðarskeiðið. Alt virksemi, sum er knýtt at ferðafólkaflutningi og ferðamannaskipum, er nærum steðgað upp, og í olju- og frálandavinnuni eru verkætlanir í hópatali avlýstar ella útsettar.

Meira fæst at vita um føroysku shippingvinnuna í ársfrásøgnini 2020 hjá Reiðarafelagnum fyri Handilsskip á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Hóast einki oljuvirksemi hevur verið á føroyska landgrunninum seinastu árini, og lítil útlit eru fyri nøkrum virksemi komandi árini, so hevur alla tíðina verið áhugi og vaksandi virksemi við royndarboringum og framleiðslu nærhendis føroyska markinum.



*„ ...føroysk vinna kann bjóða allar tær tænastur, ið øll sjóvinna nærhendis Føroyum hevur tørv á."*

Hetta eigur at vera áhugavert fyri føroyska vinnu, tí føroysk vinna kann bjóða allar tær tænastur, ið øll sjóvinna nærhendis Føroyum hevur tørv á.

Føroyar eru eitt nýmótans samfelag mitt í Atlantshavinum við góðum samskiftis, ferða- og flutningssambandi til evropeiska meginlandið. Tí eru Føroyar kappingarførar við okkara nærmastu grannalond, tá ið tað snýr seg um at veita alskyns tænastur til frálanda- og sjóvinnuna um okkara leiðir.

Harumframt eru útlit fyri nógvari skipaferðslu framvið Føroyum komandi árini. Hesi skipini skulu viðlíkahaldast, umvælast, proviantera, bunkra, og skifta manning. Her hava føroyskar tænastu- og framleiðslufyritøkur gyltar møguleikar at bjóða seg fram, mitt í ferðslumeldrinum í Atlantshavinum.

Á seinasta ársaðalfundinum í Oljuvinnufelagnum varð tí samtykt at broyta navnið og viðtøkur felagsins soleiðis, at endamálið verður víðkað til at savna allar føroyskar fyritøkur, ið veita tænastur til vinnur á sjónum í og nærhendis føroyskum øki umframt Arktis.

Í virki sínum skal Sjóvinnufelagið skipa fyri felags menning av hesum virksemi, bæði fyri einstøku fyritøkurnar og kørmunum fyritøkurnar virka innanfyri. Millum limirnar skal felagið stuðla undir samskifti og førleikamenning, og úteftir virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu.

Meira fæst at vita um Sjóvinnufelagið, undir "Vinnugreinafeløg" á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

## Heimligi eftirspurningurin farin nógv upp undir Korona

Eftir at fyrsti koronaskelkurin hevði lagt seg, vísti tað seg, at eftirspurningurin og keypsmynstrið flutti seg til heimliga marknaðin.

### Handilsvinna

Koronatiltøkini forðaðu føroyingum at fara uttanlands at ferðast, og ferðaskrivstovurnar vórðu tí noyddar at venda ferðabúnum føroyingum í hurðini. Ein partur av pengunum, sum varð settur av at ferðast fyri uttanlands, er brúktur í heimligu handilsvinnuni og til at ferðast fyri í egnum landi. Tað sæst millum annað aftur í øktari sølu av byggitilfari, húsbúnaði, klæðum, vanligum gerandisvørum umframt stóra talið av føroyingum, sum vitjaðu kring landið og føroysku gistingarhúsini í summar.

*„ ...Ein partur av pengunum, sum varð settur av at ferðast fyri uttanlands, er brúktur í heimligu handilsvinnuni."*

Umsetningurin hjá føroyskum handlum av klæðum og skóm var 20% hægri síðsta ársfjórðingi í 2020 enn sama tíðarskeið í 2019. Fyri húsbúnað og húsarhaldsvørur var umsetningurin 15% hægri, og fyri mat- og alkoholfríar drykkjuvørur var umsetningurin 11% hægri síðsta ársfjórðing 2020 samanborið við sama ársfjórðing árið fyri[3].

Meira fæst at vita um føroysku handilsvinnuna í ársfrásøgnini hjá Handilsvinnufelagnum, undir vinnugreinafeløg, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, industry.fo

## Byggivinna

Tað hevur verið stórt trýst á føroysku byggivinnuni seinastu árini, og tað sæst aftur í lønargjaldingunum og løntakaratalinum í byggivinnuni. Lønargjaldingarnar meira enn tvífaldaðust frá 2013 til 2020, men vøksturin í lønargjaldingunum í byggivinnuni var væl minni í 2020 enn árini frammanundan, sí mynd 7.

Í 2017 var lønarvøksturin í byggivinnuni 19%, í 2018 og 2019 var hann 18 og 13%, men í 2020 var árligi lønarvøksturin í byggivinnuni komin niður á 7%.

**Mynd 7: Lønargjaldingar í byggivinnuni, 2010-2020**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Henda gongdin sæst eisini aftur í løntakaratalinum í byggivinnuni, sí mynd 8. Her var árligi vøksturin størstur í 2017, tá løntakaratalið í byggivinnuni vaks við 14%. Í 2018 og 2019 var árligi vøksturin 12 og 5%, og í 2020 var vøksturin í løntakartalinum í byggivinnuni komin niður á 2%.

**Mynd 8: Løntakarar í byggivinnuni, 2010-2020**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Sambært nýggjastu hagtølunum[4], so er vøksturin í lønargjaldingunum í byggivinnuni nú steðgaður upp, og løntakaratalið er farið at minka.

Fleiri byggiverkætlanir vórðu órógvaðar og nakað seinkaðar, tá ið koronafarsóttin breyt út, men tað er ikki Korona, sum hevur tikið trýstið av føroysku byggivinnuni. Trýstið á byggivinnuna er heldur minkað, tí at fleiri størri byggiverkætlanir eru vorðnar lidnar um somu tíð.

*„ ... men tað er ikki Korona, sum hevur tikið trýstið av føroysku byggivinnuni.“*



3 *Hagstova Føroya: Smásøluvísitøl 26. mars 2021.*
4 *Hagstova Føroya: Løntakarar og lønargjaldingar 11. og 12 mai 2021.*




Meira fæst at vita um føroysku byggi- og handverkaravinnurnar í ársfrásøgnini 2020 hjá Føroya Handverksmeistarafelag á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

## Ráðgeving, tænastur og annar ídnaður

Ráðgevarafyritøkurnar í byggivinnuni fylgja gongdini í byggivinnuni annars, og beint eftir at koronatiltøkini vórðu sett í verk, merkti ráðgevaravinnan týðiliga, at fóturin varð settur á bremsuna. Verkætlanir, sum vóru í gongd, fóru niður í ferð, og samskiftið við byggiharrarnar broyttist nógv. Tað byrjaði at taka longri tíð at fáa afturmeldingar og svar frá byggiharrunum.

Fyrstu mánaðirnar undir koronatíðini hevur lítil framdrift verið í fleiri verkætlanum. Verkætlanir hava verið útsettar, bæði almennar og privatar, og ráðgevaravinnan saknar meira ítøkiligar langtíðarætlanir, bæði hjá landi, kommunum og privata geiranum.

*„ ...ráðgevaravinnan saknar meira ítøkiligar langtíðarætlanir...“*

Meira fæst at vita um føroysku ráðgevaravinnuna í ársfrásøgnini 2020 hjá Ráðgevarafelagnum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo



Føroyska KT-vinnan hevur verið í stórum vøkstri seinastu árini. Føroyar stevna inn í eina talgilda framtíð, har tøknin verður ein alt meira sjónligur partur av gerandisdegnum. Eftirspurningurin eftir KT-tænastum er tí nógv øktur, og fer at økjast enn meira frameftir.

Fortreytirnar fyri, at føroyska samfelagið skal fáa ágóðan av talgildingini er, at uppgávurnar verða bodnar út millum føroyskar fyritøkur, soleiðis at førleikarnir at viðlíkahalda talgilda infrakervið eisini eru í Føroyum í framtíðini.

Meira fæst at vita um føroysku KT-vinnuna, undir vinnugreinafeløg, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Føroyska samskiftisvinnan hevur merkt støðugt og vaksandi virksemi og framgongd hesi seinastu árini, bæði her heima og uttanlands. Koronafarsóttin ávirkaði gongdina. Prentuppgávur minkaðu munandi, og tiltøk so sum messur vórðu púrasta avlýst. Samstundis vaks eftirspurningurin eftir online loysnum. Samskiftisvinnan var skjót at tillaga seg og er komin rímiliga heilskapað ígjøgnum hetta serstaka árið.



Meira fæst at vita um føroysku samskiftisvinnuna, undir “Vinnugreinafeløg”, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Annars er føroyskur ídnaður eyðkendur við einari ella fáum fyritøkum av sama slagi, t.d. matvøruframleiðarum, bryggjaríum, prentsmiðjum og framleiðarum av reingerðarevnum. Felags fyri framleiðsluna hjá føroyskum ídnaðarfyritøkum er, at tær virka í stórari og mangan ójavnari kapping við útlendskar framleiðarar, tí hesir hava fría atgongd til føroyska marknaðinum, samstundis sum føroysku vørurnar ikki fáa somu sømdir, tá ið tær skulu seljast á marknaðunum í grannalondum okkara.

Føroyskir brúkarar eru sum heild jaligir at stuðla føroyskar framleiðslu. Serliga nú, undir koronakreppuni, hevur føroysk vinna merkt stuðulin frá føroysku brúkarunum. Føroysk vinna saknar tó neyðug



átøk frá politisku myndugleikunum at tryggja javnbjóðis kapping millum føroyska og útlendska vinnu.

## Samlaða virksemið tí ikki minkað undir Korona

Samanumtikið er føroyska samfelagið komið væl ígjøgnum koronakreppuna. Arbeiðsloysið fór eitt kvink upp, beint eftir at fyrsta smittubylgjan hevði rakt okkum, men er síðan farið niður aftur og liggur nú á 1,6%, ið ikki kann metast sum arbeiðsloysi í altjóða høpi, sí mynd 9.

Ein orsøk til, at Føroyar eru komnar so væl ígjøgnum koronatíðina er, at føroyski búskapurin var yvirupphitaður og sprutt kókaði, tá ið koronasmittan rakti okkum. Tað vóru tí nógv onnur arbeiðstilboð, sum kundu taka ímóti teimum, ið mistu arbeiðið, tá ið koronatiltøkini læstu partar av samfelagnum niður.

Ein onnur og minst líka týðandi orsøk eru føroysku átøkini at forða smittuni at koma fyri seg í samfelagnum. Føroyska koronatilbúgvingin, við áhaldandi koronakanningum, saman við virðingini hjá øllum føroyingum fyri koronatiltøkunum, hevur verið fyrimyndarlig. Hvørja ferð smittuspjaðingin hevur hótt við at taka seg upp aftur, hevur tað í felag eydnast okkum at fáa tamarhald á smittuni. Tí hevur tað borið til at havt samfelagið og heimligu vinnuna koyrandi, hóast koronasmittan hevur hingið sum eitt myrkt skýggj yvir okkum í skjótt hálvtannað ár.

**Mynd 9: Føroyska arbeiðsloysisprosentið, januar 2019 – februar 2021**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

## Framtíðarútlitini framvegis merkt av fleiri óvissum

Framtíðarútlitini eru framvegis merkt av fleiri óvissum, men útlitini eru ljósari, nú fleiri og fleiri verða koppsett og londini byrja at lata upp aftur. Føroyska ferðavinnan er spakuliga við at koma upp í ferð aftur, samstundis sum fleiri ferðamál koma á skránna.

Tiltøkini at forða koronasmittuni at spjaða seg hava eisini aðrar avbjóðingar, sum ikki vísa seg fyrr enn ein tíð er fráliðin.

Drúgvu koronatiltøkini úti í heimi hava so líðandi skapt vakandi avbjóðingar við at fáa fatar á vørum, tí nógv framleiðsla hevur verið stongd niður í longri tíð. Talan er bæði um lidnar vørur og ymsar rávørur, t.d. timbur, jarn og aðrar rávørur til víðari framleiðslu. Samstundis eru flutningsútreiðslurnar úr Asia til Evropa fleirfaldaðar hesar seinastu mánaðirnir.

Saman við nógv øktum eftirspurningi hava hesi viðurskifti havt við sær, at prísirnir á fleiri vørum verða trýstir uppeftir, og útlit eru fyri, at henda gongdin fer at halda fram í nærmastu framtíð.

Stóru útflutningsinntøkurnar í ali- og uppsjóvarvinnunum hava lagt lunnarnar undir búskaparligu framgongdina í føroyska samfelagnum nógvu tey seinastu árini. Tí skapar tað stóra óvissu í vinnuni, at Føroyar ikki longur hava atgongd til at fiska í bretskum sjógvi, eftir at Brexit gjørdist veruleiki 1. januar í ár. Hetta hevur stóran týdning fyri búskaparligu virðisøkingina, tí makrelurin skapar t.d. munandi størri virði fyri føroyska samfelagsbúskapin, tá ið hann verður fiskaður í bretskum sjógvi heldur enn í føroyskum sjógvi.

Tí metir Føroya Arbeiðsgevarafelag, at nýggj fiskivinnuavtala við Stórabretland telist millum fremstu raðfestingarnar á vinnupolitiska økinum í nærmastu framtíð.

# Tilmælir frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir framvegis til, at vinnupolitikkurin verður endurskoðaður og tillagaður dagsins samfelag. Vinnupolitikkurin eigur at taka støði í nútíðini og framtíðar avbjóðingunum hjá vinnu og samfelag. Vinnupolitikkurin eigur at verða vegvísari, har politikarar taka atlit at dagførda vinnupolitikkinum í politisku stýringini av samfelagnum, soleiðis at vinnan veit, hvørjar karmar hon hevur at virka innanfyri fleiri ár fram í tíðina.**

Vinnupolitikkurin, sum varð orðaður eftir kreppuna í fyrru helvt av 1990-árunum, eigur stóran part av æruni fyri framburðinum og vælferðini í føroyska samfelagnum í dag. Vinnupolitikkurin varð seinast dagførdur og tillagaður samfelagnum í 2005, og Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur seinastu árini fleiri ferðir mælt til, at vinnupolitikkurin verður endurskoðaður og tillagaður dagsins samfelag, men hetta er ikki gjørt enn.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur fast við tilmælini um at endurskoðað og dagføra vinnupolitikkin. Grundarlagið undir vinnupolitikkinum, sum varð orðaður eftir kreppuna í 1990-árunum, har tað m.a. varð ásettur greiður skilnaður millum privat og alment virksemi, eigur framvegis at vera tað sama. Dagføringin av vinnupolitikkinum snýr seg millum annað um hesi viðurskifti.

## Atgongd til arbeiðsmegi

At útvega arbeiðsmegi hevur verið ein daglig avbjóðing hjá føroyskum arbeiðsgevarum seinastu árini. Tí eiga stuðuls- og serskipanirnar til føroyingar, ið arbeiða uttanlands at verða endurskoðaðar, samstundis sum atgongdin til útlendska arbeiðsmegi verður víðkað og gjørd smidligari, soleiðis at føroyskir arbeiðsgevarar altíð hava atgongd til skikkaða arbeiðsmegi, um hon ikki er tøk í landinum.

Tað eru fleiri trekleikar í galdandi skipan fyri føroyskar arbeiðsgevarar at útvega útlendska arbeiðsmegi, t.d. kravið um 40 tíma arbeiðsviku fyri 3. landsborgarar og markið á 3,5% arbeiðsloysið, áðrenn føroyskar fyritøkur kunnu fáa atgongd til arbeiðsmegi úr ES, sambært skipanini við forhhondsgóðkenning at seta fólk í starv.

Tað er ov avmarkandi, at forhondsgóðkenningin fyri at seta í starv útlendska arbeiðsmegi, bert er galdandi fyri ES-borgarar. Henda skipanin eigur at verða víðkað, soleiðis at hon verður galdandi yvirhøvur og ikki bert fyri ES-borgarar. Um tað ikki ber til, eigur líknandi skipan at verða galdandi fyri arbeiðsmegi úr øðrum londum.

Hesir trekleikar virka avmarkandi fyri framhaldandi vøkstri í føroyskari vinnu í kappingini við útlendskar arbeiðsgevarar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag skilir væl, at tað kunnu vera aðrar politiskar avbjóðingar við at lata føroyska arbeiðsmarknaðin upp fyri útlendskari arbeiðsmegi, men føroysk vinna hevur longu drúgvar royndir við útlendskari arbeiðsmegi. Tí átti politiska skipanin, í samráð við vinnuna, at gjørt tað lagaligari fyri arbeiðsmegi úr útvaldum londum, sum vit longu hava góðar royndir við, at koma til Føroyar at arbeiða.



## Fiski- og handils-vinnuavtalur

Føroyar eru ein lítil opin marknaðarbúskapur í altjóða samfelagnum, og føroyska vælferðin er fyri stóran part grundað á breiða og smidliga atgongd til útlendskar marknaðir. Størsti parturin av nýtsluvørunum í føroyska gerandisdegnum verður innfluttur, samstundis sum stórur partur av vinnuligu framleiðsluni verður útfluttur og seldur á útlendskum marknaðum.




Føroyski gerandisdagurin er sostatt eyðkendur við stórum og fjølbroyttum flutningi av vørum og tænastum tvørtur um landamørkini.

Handils- og samstarvsavtalur við onnur lond hava tí stóran týdning fyri føroyska vinnu og samfelagið annars, men í løtuni hava Føroyar bert 6 fríhandilssáttmálar við onnur lond. Hetta er munandi færri enn okkara kappingarneytar hava. ES-londini hava fríhandilssáttmálar við 69 lond uttanfyri ES. EFTA-londini hava fríhandilsavtalur við 40 lond uttanfyri EFTA, umframt einstøku avtalurnar, EFTA londini hava, hvør í sínum lagi.

Tað eru sostatt rúm fyri nógv fleiri avtalum við onnur lond til frama fyri virðisøkingina í føroyska samfelagnum. Hetta er ikki bert galdandi fyri vørur og tænastur, men eisini viðvíkjandi atgongd til at fiska í t.d. bretskum sjógvi eftir Brexit.

Politiska skipanin eigur tí at raðfesta sáttmálar við onnur lond ovarlaga, soleiðis at altjóða marknaðirnir verða breiðari, smidligar og meiri vælvirkandi fyri føroyska vinnu.

## Dagføra kappingaravlagandi skipanir

Tað er harumframt tørvur á fleiri tillagingum og dagføringum í kappingaravlagandi skipanum á heimliga marknaðinum, t.d. í kappingarfortreytunum fyri netpakkar.

Í dag eru vørur, sum føroyskir brúkarar keypa frá útlendskum nethandlum, upp til 300 kr., frítiknar fyri meirvirðisgjald og toll. Um sama vøra verður keypt frá føroyskum handli, skal meirvirðisgjald og tollur rindast av alliri upphæddini. Hetta er ein kappingaravlagandi skipan, við fíggjarligum stuðli úr landskassanum, til frama fyri útlendskar nethandlar, í kappingini við føroyska handilsvinnu.

Um marknaðirnir skulu vera vælvirkandi, so eiga kappingarfortreytirnar frá føroysku myndugleikunum at vera tær somu, líka mikið, um vøran verður keypt frá einum útlendskum ella føroyskum handli.

## Støðugar karmar og langtíðarætlanir

Tað hevur stóran týdning, at vinnan kennir karmarnar, hon fær at virka innanfyri, frá politisku skipanini, nøkur ár fram í tíðina, soleiðis at vinnan kann leggja sínar ætlanir innan hesar karmar. Politisk óvissa eigur ikki at vera partur av váðamyndini hjá føroysku vinnuni, tí gerandisdagurin í føroyskari vinnu er longu merktur av nógvum óvissum frammanundan.

Í fiski- og alivinnunum, sum serliga virka á útflutnings-síðuni í føroyska búskapinum, fylla náttúruviðurskifti, fiskasjúkur, marknaðaratgongd, prísir á rá- og lidnari vøru umframt onnur viðurskifti uttanífrá, nógv í dagligu váðametingunum. ES-boykotti av føroyskum útflutningsvørum í 2013 og avleiðingarnar av koronatiltøkunum eru dømir um, hvussu brádliga marknaðirnir og umhvørvið hjá føroyskum útflutningsvinnum kunnu broytast.

Broytiliga umhvørvið hjá føroysku vinnuni ger tað avbjóðandi at leggja ætlanir frameftir. Stórar og ófyrireikaðar broytingar í lógum, kunngerðum, mannagongdum og tænastustøði gera tað tí enn meiri tvørligt og avbjóðandi hjá vinnuni at leggja ætlanir frameftir.

Tað hevði lætt um hjá vinnuni, um politisku flokkarnir megna at gera breiðar almennar langtíðarætlanir og -semjur um vinnuligu karmarnar komandi árini. Hetta

hevði skapt meira støðugar karmar um vinnuliga virksemið til gagns fyri føroyska kappingarførið.

Tað merkir tó ikki, at karmarnir eru óbroytiligir. Um tað eru skilagóðar orsøkir til lógarbroytingar, ið ávirka vinnuligu karmarnar, so skal tað sjálvandi bera til at fremja hesar. Tá er umráðandi, at broytingarnar verða væl fyrireikaðar og at viðkomandi partar verða hoyrdir og fáa høvi at gera viðmerkingar, áðrenn nakað verður sett í gildi. Harnæst er umráðandi, at vinnan fær hóskandi tíð til at fyrireika seg til møguligar broytingar.

## Lægri lønarskatt og kappingarføra skattaskipan

At skattaskipanin er kappingarfør merkir, at tað ikki eru skatta- og avgjaldsskipanirnar, ið eru avgerandi fyri, um føroyskir løntakarar velja at fara av landinum at arbeiða ella hvat teir annars velja at fáast við á heimliga arbeiðsmarknaðinum.

Harumframt er týðandi, at skatta- og avgjaldsskipanirnar eru settar saman soleiðis, at tær ikki eru kappingaravlagandi og hava neilig árin á virkis- og framleiðsluhugin, og harvið eisini á virðisskapanina í landinum.

OECD hevur víst á, at tað serliga er høgur partafelagsskattur og høgur lønarskattur, sum hava neiliga ávirkan á virðisskapanina, tí ov høgir partafelags- og lønarskattir minka um íløgu- og arbeiðshugin.

Hesum sjónarmiðum tekur Føroya Arbeiðsgevarafelag undir við. Tó skal tað viðmerkjast, at føroyski felagsskatturin á 18% verður mettur at vera kappingarførur í altjóða høpi í løtuni.

Føroyar eru eitt nýmótans og vælvirkandi vælferðarsamfelag, við sama tænastustøði, sum mest framkomnu vælferðarsamfeløgini um okkara leiðir. Eitt nýmótans vælferðarsamfelag er kostnaðarmikið í rakstri, og í Føroyum verða stórir partar av vælferðartænastunum fíggjaðar umvegis lønarskattin. Føroyski lønarskatturin er sostatt høgur, tí talið av løntakarum er avmarkað í mun til høga tænastustøðið.

Tað leggur harumframt eyka trýst á føroyska løntakaran, at føroyska samfelagið er sera opið, við fleiri serskipanum fyri arbeiðsmegi, ið arbeiðir aðrastaðni, umframt fólki, sum koma til landið í styttri tíðarskeið. Hesi rinda ikki sama lønarskatt, sum vanligi lønmóttakarin í Føroyum, men tey hava fyri stóran part somu atgongd til vælferðartænsturnar, sum føroyski lønmóttakarin rindar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir tí ikki, at føroyska skattaskipanin er tíðarhóskandi og egnað til framhaldandi menning av føroyska vælferðarsamfelagnum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tí í fleiri umførum mælt til at lækka persónliga inntøkuskattin, serliga lægri marginalskatt á lág- og miðalinntøkur. Munagóðir skattalættar koma at kosta almennu kassunum stórar upphæddir. Tí má hetta fremjast yvir eitt longri áramál í tøttum samstarvi millum land og kommunur, har vanligi inntøkuskatturin stigvíst verður lækkaður, samstundis sum frádráttir og serskipanir verða strikaðar, og fleiri tænastu- og brúkaragjøld koma ístaðin.

Tað ber neyvan til at fremja slíkar umskipanir til fleiri tænastu- og brúkaragjøld, sum ikki koma at venda tunga endan niðureftir. Lægstu inntøkurnar í Føroyum rinda lutfalsliga lítið í inntøkuskatti, og skal tað vera møguligt at geva miðalinntøkunum ein skattalætta, sum verður fíggjaður við breiðari skattagrundarlagi, so verður trupult ikki at raka lægstu inntøkurnar neiliga. Tí verður helst eisini neyðugt við afturberingum til lægstu inntøkurnar.

Tað hevur harumframt stóran týdning, at skattaskipanin er soleiðis sett saman, at tað altíð loysir seg at arbeiða. Tað má ongantíð vera skattaskipanin, sum setir lønmóttakarar í eina slíka støðu, at tað fíggjarliga loysir seg betur at lata vera við at arbeiða.




# Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum. Fremsta uppgávan hjá felagnum er at umboða føroyskar arbeiðsgevarar mótvegis føroysku løntakarafeløgunum í lønar- og sáttmálasamráðingum, og at ráðgeva limum sínum í dagligum spurningum um ymisk sáttmálaviðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag er eisini andlitið úteftir hjá føroyskum arbeiðsgevarum í almenna rúminum.**

## Limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Føroyskir arbeiðsgevarar og fyritøkur kunnu vera beinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, ella umvegis arbeiðsgevarasamskipanir í teirra vinnugrein, sum eru limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Arbeiðsgevarasamskipanirnar í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru:

- Føroya Handverksmeistarafelag
- Føroya Prentsmiðjufelag
- Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Undir arbeiðsgevarasamskipanunum eru eisini lokal feløg, sum tí eisini eru óbeinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, umvegis arbeiðsgevarasamskipanirnar omanfyri.

Fyritøkur og arbeiðsgevarar, sum ikki hoyra undir virkisøkini hjá arbeiðsgevarasamskipanunum omanfyri, eru beinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

## Uppgávur og endamál hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Ein tann størsta uppgávan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at samráðast og gera sáttmálar fyri føroysku

vinnuna við løntakarafeløgini á privata føroyska arbeiðsmarknaðinum. Endamálið er at tryggja støðug viðurskifti og tálma lønarvøksturin á privata føroyska arbeiðsmarknaðinum til frama fyri føroyska kappingarførið.

Umsitingin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag veitir limunum tænastur og ráðgeving viðvíkjandi spurningum um t.d. starvsfólkaviðurskifti og leiðslu, lønarsáttmálar, lógir og reglur á vinnuøkinum o.s.fr. Umsitingin hevur harumframt tætt sambond við vinnuna í øðrum londum, og virkar tí eisini sum sambindingarlið millum føroyska og útlendska vinnu.

Ein onnur týdningarmikil uppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at umboða føroyska vinnu mótvegis føroysku myndugleikunum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er hoyringspartur hjá føroyskum arbeiðsgevarum viðvíkjandi lógum og reglum, sum politisku myndugleikarnir arbeiða við at seta í verk. Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at ávirka lógarsmíðið soleiðis, at vinnuligu karmarnir tæna og ikki darva vinnuliga virksemið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er harumframt, bæði beinleiðis og umvegis hini arbeiðsgevarafeløgini, umboðað í nógvum ymiskum stýrum, nevndum og ráðum, ið seta karmar fyri føroyska vinnu. Her gera feløgini sína ávirkan galdandi, soleiðis at vinnusjónarmið vinna frama. Hetta skal tryggja limunum í Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tað frameftir verður liviligt hjá fólki við fyritaksemi og hugskotum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag virkar eisini sum andlitið úteftir hjá limum sínum við at kunna og leggja fram sjónarmiðini hjá arbeiðsgevarasíðuni í almenna rúminum.

Felagið skipar javnan fyri størri og smærri tiltøkum fyri limir sínar, t.d. árliga vinnudagin og ymisk kunningartiltøk um broytingar í lóggávu, sáttmálum og tílíkum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag setir eisini eftir tørvi arbeiðsbólkar at greina mál og stevnur, sum ofta gerast hornasteinar í almenna vinnupolitikkinum hjá felagnum.

Meira kunning um lógir o.a. viðvíkjandi Føroya Arbeiðsgevarafelag er at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

# Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag verður vald á árliga aðalfundinum í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Í lóggávu felagsins er ásett, at nevndin skal veljast soleiðis, at hon umboðar tær ymisku vinnugreinarnar og landið, so væl sum til ber. Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag er mannað soleiðis:



## Bogi Jacobsen
*Formaður*

Bogi Jacobsen er stjóri í framleiðslu og útflutningsfyritøkuni Varðin Pelagic umframt reiðarínum Varðin. Bogi Jacobsen varð valdur í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2014 og til formann í 2017.



## Høgni Hansen
*Næstformaður*

Høgni Hansen er stjóri í heilsøluni Poul Hansen, og nevndarlimur í fleiri øðrum fyritøkum. Høgni Hansen var nevndarlimur í Havnar Arbeiðsgevarafelag, áðrenn felagið varð avtikið. Í 2011 varð Høgni Hansen valdur í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og hevur verið næstformaður felagsins síðan tá.



## Kristoffur Laksá
*Nevndarlimur*

Kristoffur Laksá er samráðingarleiðari Føroya Arbeiðsgevarafelags. Kristoffur Laksá er eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum og sat í nógv ár í nevndini í Føroya Prentsmiðjufelag. Kristoffur Laksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



## Jóhanna á Bergi
*Nevndarlimur*

Jóhanna á Bergi er stjóri í Atlantic Airways. Áðrenn tað, var hon stjóri í flutningsfyritøkuni Faroe Ship. Jóhanna á Bergi varð vald í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2019, men hon sat eisini í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag, árini frá 2008 til 2014.



## Jón Sigurdsson
*Nevndarlimur*

Jón Sigurdsson er stjóri og stovnari av byggifyritøkuni Articon. Umframt at hava verið nevndarlimur í Føroya Handverksmeistarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag í mong ár, er hann eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Sigurdsson hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004.



## Fróði Magnussen
*Nevndarlimur*

Fróði Magnussen er stjóri á KT-fyritøkuni Formula. Fróði Magnussen hevur verið formaður í KT-felagnum og er framvegis nevndarlimur har, umframt at vera nevndarlimur í øðrum fyritøkum. Fróði Magnussen hevur sitið í nevndini fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.



## Jens Meinhard Rasmussen
*Nevndarlimur*

Jens Meinhard Rasmussen er stjóri í Skansi Offshore og Smyril Line. Jens Meinhard Rasmussen er formaður í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip og nevndarlimur í International Chamber of Shipping. Jens Meinhard Rasmussen hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Árni Ellefsen
*Nevndarlimur*

Árni Ellefsen er stjóri í BankNordik. Árni Ellefsen er formaður í Arbeiðsgevarafelagnum hjá Fíggjarstovnum í Føroyum umframt at vera nevndarlimur í øðrum fyritøkum. Árni Ellefsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Odd Eliasen
*Nevndarlimur*

Odd Eliasen er stjóri í Havsbrún og partur av samtaksleiðsluni í Bakkafrost. Odd Eliasen hevur verið nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



# Vinnuhúsið

Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreinafeløgunum í Vinnuhúsinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta fatan, at tað hevur týdning at savna føroysku vinnuna, soleiðis at vinnan fær ein sterkari samleika í samfelagnum umvegis felags umboðan.

Føroya Arbeiðsgevarafelag nýtir Vinnuhúsið sum miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti.

Í Vinnuhúsinum verða bond knýtt millum leiðarar í vinnuni, bæði her heima og uttaneftir, tí Vinnuhúsið oftani er karmur um vitjanir uttaneftir.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag.

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rakstrinum, men bjóðar ymsum vinnugreinafeløgunum at húsast í Vinnuhúsinum.

Í dag húsast 14 feløg undir sama takið í Vinnuhúsinum. Fimm arbeiðsgevarafeløg og nýggju vinnugreinafeløg. Harumframt leiga Føroya Reiðarafelag og Felagið Nótaskip skrivstovur í Vinnuhúsinum.

Tey fimm arbeiðsgevarafeløgini eru:

- Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Føroya Handverksmeistarafelag
- Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum
- Føroya Prentsmiðjufelag
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Sum nevnt aðrastaðni í frágreiðingini, so umboðar Føroya Arbeiðsgevarafelag hini fýra arbeiðsgevarafeløgini omanfyri, tær sokallaðu arbeiðsgevarasamskipanirnar, í sáttmálasamráðingum við fakfeløgini.

Einstøku arbeiðsgevarafeløgini arbeiða dagliga við at ráðgeva limum sínum við sáttmála- og arbeiðsmarknaðarspurningum, umframt at leggja til rættis arbeiðsmarknaðarmál og yvirskipaðar vinnukarmar.

Tey nýggju vinnugreinafeløgini eru:

- Havnar Handverksmeistarafelag
- Havbúnaðarfelagið
- Føroya Ráfiskakeyparafelag
- Handilsvinnufelagið
- KT-felagið
- Sjóvinnufelagið
- Samskifti
- Ráðgevarafelagið
- Ferðavinnufelagið

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri akkurát teirra vinnugrein. Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum.

Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipað av umsitingini í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

Hesi feløgini leiga skrivstovu í Vinnuhúsinum:

- Føroya Reiðarafelag
- Felagið Nótaskip

Hesi bæði feløgini eru ikki limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag ella partar av Vinnuhúsinum annars.